UTTAN ÚR HEIMI

## Eig at bora norðanfyri

Í fleiri ár hava norðmenn bíðað við at fara undir oljuvinnu í Barentshavinum, tí mótstøðan hevur verið so stór, men soleiðis er ikki longur.

Ein nýggj meiningakanning vísir, at í dag eru bara 20 prosent av norðmonnunum ímóti oljuvinnu í Barentshavinum. Tað áhugaverda við kanningini er kanska, at í Finnmørkini svaraðu øll tey spurdu, at oljufeløgini eiga at fara undir vinnu í Barentshavinum. Ikki ein einasti har var ímóti. Eisini í Rogalandi, sum er týðandi oljuøki, var stórur meiriluti fyri at loyva oljufeløgunum at bora norðanfyri.

Politikararnir hava verið varnir, tí teir bera ótta fyri, at oljuvinnan kann órógva fiskin í Barentshavinum. Upp undir stórtingsvalið í heyst hava serliga flokkarnir á vinstravonginum mælt frá oljuvinnu í Barentshavinum.

## Bensinið dýrt í USA

Bileigararnir í USA ilskast í hesum døgum um, at tað er vorðið sera dýrt at fylla tangan.

Í gjár kostaði ein litur av bensini knappar fimm krónur liturin, og tað er nógv í USA. Orsøkin til tann høga prísin er, at ódnin "Katrina" hevur lagt tey flestu oljureinsiverkini við Meksikanska Flógvan still. Summi hava fingið skaða, onnur standa undir í vatni, og tey flestu hava ongan streym.

Bensinprísurin var hækkaður í USA, áðrenn "Katrina" kom, so hon hevur bara gjørt ilt verri. Samstundis ávara serfrøðingar um, at bensinið verður uppaftur dýrari, enn tað er nú. Stovnurin Oil Price Information segði í gjár, at bileigararnir hava ikki merkt tað ringasta enn. Sagt varð, at tað er ikki ein spurningur, um bensinið verður dýrari, men heldur nær tað dýrkar, hvussu dýrt tað verður, og hvussu leingi tann høgi prísurin fer at halda sær.

Sambært Oil Price Informatiuon er tað væl hugsandi, at bensinprísurin í USA fer at hækka eini 25 prosent eftir stuttari tíð.

## Burturfluttu breta

Vápnaðir menn í Afghanistan burtufflluttu hósdagin ein bretskan verkfrøðing og tulk hansara. Løgreglan royndi at verja teir, og tríggir løgreglumenn lógu eftirá.

Afghanski innanríkisráðharrin, Lafullah Mashal, vil vera við, at tað eru vanligir brotsmenn, sum hava burturflutt bretan, men løgreglan heldur, at tað var Taliban, sum skipaði fyri burturflytingini. Í gjár var framvegis einki krav komið frá burturflytarunum um møguligt loysigjald.

Ein talsmaður hjá NATO-deildunum í Afghanistan segði í gjár, at NATO er sinnað at hjálpa afghansku myndugleikunum at finna bretska verkfrøðingin, sum arbeiddi við at halda vegin ímillum býirnar Kandahar og Herat har vesturi í Afghanistan við líka.

## Lótu fangar leysar

Í gjár var tjóðardagur í Vietnam, og í tí sambandi gjørdu myndugleikarnir at geva 10.000 fangum grið.

Teirra millum vóru fleiri fangar, sum Amnesty International hevur skrásett sum samvitskufangar. Ein teirra er Tran Van Luong, sum bleiv dømdur til deyða í 1988, tí hann hevði arbeitt ímóti myndugleikunum. Dómurin bleiv kortini seinni broyttur til lívlangt fongsul, men í gjár slapp hann leysur.

Fleiri lond, teirra millum Noreg, hava javnan samrøður við vietnamesisku myndugleikarnar um samvitskufangarnar, og ætlandi verður ein fundur av hesum slagnum í Hanoi eina ferð í heyst, skrivar ANB.

# Gloymdu tey fátæku



*Tey, sum ikki áttu bil, sluppu ikki úr New Orleans, áðrenn ódnin kom, tí myndugleikarnir gloymdu at lata bussar flyta tey burtur*

**Brotsmenn í New Orleans gera sær dælt av ruðuleikanum aftan á ódnarveðrið. Tí eru túsundtals hermenn sendir til býin. Samstundis verða myndugleikarnir lagdir undir vánaliga fyrireiking undan ódnini. Teir gloymdu tey fátæku**

NEW ORLEANS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Lógloysi valdar í New Orleans. Lík flóta í gøtunum, summastaðnni eru bardagar ímillum brotsmannalið, og fleiri løgreglumenn hava sagt upp. Sjúkrahúsini fáa hvørki mat ella heilivág til sjúklingarnar, og læknarnir siga, at bæði teir og sjúklingarnir mugu flytast úr býnum, kemur ikki annað skil á. Umleið 25.000 fólk eru stúgvað saman á einum ítróttarøki undir sera vánaligum umstøðum. Um allan býin sløðast lík, og myndugleikarnir hava ávarað um umfarssjúkur.

Í gjár bað Kathleen Blanco, guvernørur, stjórnina í Washington senda 40.000 hermenn til býin at fáa skil á. Framman undan vóru nakrir hundrað hermenn komnir úr Arkansas, og 300 hermenn, sum júst vóru komnir aftur úr Irak, fingu boð um at fara beinleiðis til New Orleans.

- Hermenninir hava fingið boð um at skjóta, so vit mkunnu fáa enda á lógloysinum, segði guvernørurin.

### Vánalig fyrireiking

Myndugleikarnir í Louisiana og Mississippi eru fyri hvøssum atfinningum, tí fleiri vilja vera við, at teir vóru alt ov illa fyrireikaðir til ódnarveðrið. Tað rakti serliga tey fátæku.

- Tað kennist, sum at myndugleikarnir í New Orleans hugsaðu bara um tey, sum høvdu bil. Einki varð sagt um, hvussu hini kundu sleppa úr býnum, áðrenn ódnin kom, sigur Lloyd Dumas, professari á University of Texas við The Guardian. Hann er ikki tann einasti, sum fýlist á myndugleikarnar. Fleiri onnur vísa á, at tá myndugleikarnir góvu fólki boð um at fara úr New Orleans, var tað eingin, sum hugsaði um tey, ið ikki høvdu bil. Har vóru eingir bussar, so tey, ið ikki kundu fara sjálvi, noyddust at verða verandi í býnum.

-Tað er sera hugstoytandi, tí serliga í New Orleans eru nógv fátæk fólk, sum búgva undir sera vánaligum umstøðum. Tey áttu lítið, og nú eiga tey einki, sigur Michael L. Lomax, stjóri á stovninum Negro College Found, við Los Angeles Times, sum skýrir ódnina "vanlukku teirra fátæku".

### Fleiri túsund deyð

Enn veit eingin, hvussu mong mannalív "Katrina" hevur kravt, men tey flestu vænta, at talan helst er um fleiri túsund. Umleið 80 prosent av New Orleans stendur undir í vatni, og serfrøðingar hjá herinum hava roknað út, at tað fer at taka seks mánaðir at fáa vatnið úr býnum.

Í grannastatinum Mississippi vita myndugleikarnir heldur ikki, hvussu mong eru deyð, men Harly Barbour, guvernørur, segði í gjár, at talan er um nógv fólk.

# Dýrt at koyra bil í grannalondunum

**Í Danmark og Noregi er bensinið dýrkað sera nógv teir seinastu dagarnar.**

BENSINPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað verður altsamt dýrari at koyra bil. Í Danmark er bensinprísurin hækkaður nógv teir seinastu dagarnar. Mikudagin hækkaði bensin við 95 oktan 58 oyru liturin, og í gjár komu 39 oyru omaná.

Tað ber í sær, at danir noyddust at gjalda 11,14 krónur fyri ein litur av oktan 95 í gjár. Og sambært fjølmiðlunum kundi tað loysa seg at fylla tangan í gjár, tí ætlandi fer prísurin 30 oyru upp afturat í dag.

Í oljulandinum Noregi er sama skilið. Í gjár lá prísurin nógvastaðni oman fyri 12 norskar krónur fyri ein litur av oktan 95, og tann hægsta prísin hevði Aftenposten funnið norðuri í Tromsø, har ein litur kostaði 13,95 krónur.

Norsku bensinsølurnar siga, at stendur príshækkingin á altjóða oljumarknaðinum við, kann bensinprísurin koma upp á 15 krónur.